Ársfrágreiðing fyri skúlaárið 2015 – 2016
(2016– 2017)

Skúlin í Eysturkommunu

Skúlarnir í Eysturkommunu, Gøtu skúli og Leirvíkar skúli, hava síðani samanleggingina av kommununum í 2009 verið gjøgnum fleiri broytingar.

Fyrstu broytingarnar vóru í 2010, tá skúlarnir blivu samskipaðir, so at innskúlingin bleiv í Leirvík og miðdeildin í Gøtu. Haraftrat avgjørdi kommunan at seta á stovn forskúla, sum bleiv lagdur saman við innskúlingin í Leirvík.

Skipanin við tveimum skúlum helt fram til 1. januar 2013, tá skúlarnir blivu lagdir saman til ein skúla við einum skúlastýri, einum skúlastjóra og einum varaskúlastjóra/ deildarleiðara.

Í skúlastýrið verða trý foreldraumboð vald, tvey kommunustýrisumboð og eitt starvsfólkaumboð. Formaður og næstformaður skulu veljast millum foreldraumboðini. Skúlastjórin er skrivari í skúlastýrinum. Skúlastýrið skipaði seg soleiðis:

Páll Isholm, formaður
Ove Heinesen, næstformaður
Beinta Dalheim, foreldraumboð
Brandur Jacobsen, kommunustýrisumboð
Hanna Jensen, kommunustýrisumboð
Jórun Eið, starvsfólkaumboð

Eins og nýtt skúlastýri bleiv skipað, so bleiv leiðslan eisini skipað av nýggjum. Fríðfinnur Johnsson bleiv settur sum skúlastjóri og Karl Thomsen bleiv settur sum varaskúlastjóri/ deildarleiðari fyri deildina í Gøtu. Farna skúlaár fór Karl Thomsen frá, og Mariann D. Poulsen varð sett sum varaskúlastjóri.

Næmingar

Skúlaárið 2015-2016 gingu 250 næmingar í skúlanum. 121 í skúlaspíranum og innskúlingini í Leirvík og 129 í miðdeildini í Gøtu.

Skúlaárið 2016-2017 ganga 258 næmingar í skúlanum. 126 í skúlaspíranum og innskúlingini í Leirvík og 132 í miðdeildini í Gøtu.

Árgangirnir eru um 30 næmingar í miðal.

Hetta er í nógvar mátar ein góð skúlastødd. Bæði fyri einstaka næmingin og fyri skipanina av undirvísingini og skúladegnum. Næmingatal ger nevniliga, at allir næmingar hava lættari við at finna sín javnlíka og trívast, og skúlin fær eisini so mikið væl av tímum, at til ber hjá leiðslu og lærarum at fyriskipa og geva ein góða og fjølbroytta undirvísing.

Starvsfólk

Í skúlanum eru 24 lærarar, 2 námsfrøðingar, sum arbeiða í Skúlaspíranum og 3 námsfrøðiligir stuðlar.

Trivnaðarætlan

Skúlastýrið hevur í eina tíð saman við leiðslu og námsfrøðiliga ráðnum arbeitt við eini trivnaðarætlan. Í vár bleiv hendan ætlan endaliga samtykt Ætlanin er rættuliga umfatandi og umfatar nógvar lutir, sum á ein ella annan hátt kunnu vera viðkomandi fyri at skapa tryggleika og trivnað á einum skúla.

Hølisumstøður

Samanumtikið eru hølisumstøðurnar góðar. Skúlatýrið hevur tó í íløguætlanini havt nøkur ynski um ábøtur. Serliga eru tað viðurskifti, sum blivu útsett í samband við umbyggingina.

Innskúlingin. Allir fýra árgangirnir hava nú 2 heimastovur, so nú ber til at býta allar árgangirnar. Harumframt hevur skúlin fimleikarhøll, svimjihøll, evningsstovu/heimastova, bókasavn og miðhøll, og lærarar hava seinasta skúlaár eisini fingið eina stovu til fyrireiking.

Skúlastýrið hevur ynskt at fáa bøtt um felagshølini, sum knýta bygningarnar saman, men enn er hetta ikki blivið veruleiki, men stendur á langtíðarætlanini fyri skúlan.

Miðdeildin. Allir 8 flokkar hava sína heimastovur. Harumframt hevur skúlin fimleikarhøll og bókasavn og serstovur til tónleik, heimkunnleika, smíð, evning og náttúrulærugreinar.

1929-bygningurin hevur havt trupulleikar við soppi. Ymiskar ábøtur eru gjørdar, og m.a. er nú drenað kring bygningin. Tó manglar enn at gera útsúgvingina. Eisini eru umstøður gjørdar til súkklur.

Skúlastýrið hevur sett ovast á raðfestingarlistan, at umstøðurnar hjá lærarum og leiðslu gerast betri í Gøtu. M.a. við lærarafyrireikingarhøli og fyrisitingarøki. Hesi høli eru sjálvsagdur lutur í einum nútímans skúla.

Eisini er ynskiligt at skúlaplássið blívur meira fjøltáttað og verður gjørt snøgt og liðugt niðanfyri nýggja bygningin.

Serdeildin. Serdeildin byrjaði í Leirvíkar skúla skúlaárið 2009-10.
Fyrsta árið var hon í stovninum á Gásamýru, men í 2010 flutti hon út í skúlan í Leirvík, og fór at halda til í hølunum, sum bókasavnið hevði havt. Skúlaárið 2014-15 fekk serdeidin eisini høli í skúlanum í Gøtu. Tey eru í gamla skúlanum frá 1890. Í ár er serdeildin bæði í hølunum í Leirvík og í Gøtu, tí næmingar bæði í innskúlingini og miðdeildini ganga í serdeildina hjá okkum.

KT - útgerð

Allar heimastovurnar hava samvirka talvu og tráleyst internet, so til ber at brúka næminga teldur/teldlar um allan skúlan. Skúlin brúkar FirstClass skipanina hjá føroyska skúlaverkinum og Office 365.

Farna skúlaárið blivu íløgur gjørdar í nýggjar næmingateldur í miðdeildini.

LP – myndilin

Hetta skúlaárið eru starvsfólk skúlans farin í gongd við at arbeiða eftir LP-myndlinum. LP stendur fyri læriumhvørvi og pedagogisk greining. Málið við LP-myndlinum er at skapa eitt gott læriumhvørvi, so allir næmingar fáa so góðar treytir fyri sosialari og fakligari menning sum gjørligt. Arbeitt verður í trimum toymum og fundur er annan hvønn týsdag. Elisabeth Poulsen er toymisleiðari.

TÍTT

Síðani 2014 hevur innskúlingin 0. til 3. flokk, verið við í hesi skipanini. Skipanin verður eisini brúkt í dagstovnunum og frítíðarskúlanum. TÍTT merkir tiltøk í tøkum tíma. Endamálið við hesi skipan er at fylgja trivnaðinum hjá øllum næmingum og at seta inn við hjálp hjá næmingum, sum av eini ella aðrari orsøk ikki trívast nóg væl.

Skúlakór í miðdeildini

Ynski hevur leingi verið at fáa eitt skúlakór í Eysturkommunu, og nú er gongd komin á. Miðdeildin hevur skúlakór á tímatalvuni ein tíma um vikuna. Tað er Marta á Lakjuni, sum stjórnar kórinum. Næmingarnir velja sjálvir, um teir vilja syngja í kórinum ella vera í sínari heimastovu til vanligan sangtíma. Umleið 30 næmingar syngja í skúlakórinum.

Uttanduraøkið

Arbeitt verður støðugt við forbetringum av uttanduraøkinum, tó at hetta gongur væl seinni enn skúlastýrið hevði ynskt.

Í **innskúlingin** hevur skúlagarðurin leingi staðið á ynskilistanum hjá skúlastýrinum, og nú er loksins komið á mál við ætlanunum á skúlagarðsøkinum. Eftir er at gera økið frammfyri nýggja bygningin liðugt.

Í **miðdeildini** hava børnini tveir góðar FIFA-vøllir at spæla á. Annar vøllurin hevur vanliga stødd, meðan hin er ein stórur FIFA-vøllur. Næmingarnir skiftast um at brúka hesar vøllir. Tey eru sera glað fyri teir.

Næmingarnir hava eisini eitt gott øki millum skúlabygningarnar, sum er lagt við asfalti. Her ber til at spæla onnur spøl. Umframt hetta, so sleppa børnini at spæla runt um allan skúlan.

Eitt øki niðanfyri nýggja vøllin er lagt av til spæliøki hjá næmingunum, men tað er ikki klárt enn. Ynskiligt er at hetta økið eisini verður gjørt, so uttanduraøkið í miðdeildini verður meira fjøltáttað, og at hesi økini verða gjørd liðug.

Felagstiltøk fyri skúlarnar

Umráðandi er skapa nakrar felags siðvenjur fyri nýggja skúlan, sum kunnu styrkja samleikan og kunnleikan hjá næmingum, starvsfólki, foreldrum og lokalumhvørvinum sum heils. Jólini og dansitíðin hava í so máta hepnast sera væl.

Síðsta skúladag fyri jól fara allir næmingarnir í kirkju. Kirkjugongdin verður annaðhvørt ár í Leirvík og annaðhvørt ár í Gøtu. Í ár var kirkjugongdin í Gøtu.

Dansidagarnir eru tveir í tali. Ein í Leirvík og ein í Gøtu. Avtalað er, hvørji kvæði vit læra, so allir næmingarnir hava lært tað sama.

Skipanir og tiltøk

Mjólkarskipanin er ein skipan, har allir næmingar kunnu keypa mjólk í skúlanum.

Báðar deildirnar bjóða foreldrum í skúlan í sambandi við **fastalávintshald**, tá verður dansað, sligið tunnað o.a.

Eftirmetingar av øllum næmingunu eru tvær ferðir árliga. Hesar eftirmetingar verða brúktar í sambandi við foreldraviðtalur.

Foreldrafundir, har ið starvsfólkini kunna foreldrini um skúlagongdina.

Rennidagur er fyrst í skúlaárinum.

Útferðir verða gjørdar, og 7. flokkur fer á hvøjrum ári á seturskúla. Stundum verður farið av landinum.

Dansistevnan. Í 2015 vóru næmingar í 3. flokki á dansistevnini, sum tá var í Leivík. Ætlanin er, at hetta skal gerast ein fastur táttur, at 3. flokkur fer á dansistevnuna.

Innskúlingin liggur tætt við **Eldrasambýlið**, Giljagarð. Her hevur skúlin ta skipan, at ein flokkur fer hvørja viku at vitja. Næmingarnir heilsa upp á búfólkini og syngja fyri teimum. Giljagarður bjóðar bollar og kakao.

Miðdeildin vitjar eldrasambýlið, Gøtubrá, nakrar ferðir um árið. Serliga í sambandi við Lusiagongd og føstulávint.

Í sambandi við at kunna **næmingalaga undirvísingina** betur, eru tímarnir í føroyskum og støddfrøði í miðdeildini lagdir saman soleiðis, at 4. og 5. flokkur hava lærugreinarnar samstundis og 6. og 7. flokkur samstundis. Hetta letur upp fyri møguleikum sum at kunna býta næmingarnar í øðrvísi

bólkar enn vanliga floksuppbýting, so næmingar við á leið sama tørvi og á leið somu avbjóðingum, kunnu arbeiða saman og læra saman.

Heimasíðan

Á heimasíðuni hjá skúlanum www.skeyk.com verður kunnað um tiltøk og annað í skúlanum, og hvør flokkur hevur eisini sína first class síðu við heimasetningi og boðum annars.